VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Oljuleitingin – eitt ljós í myrkurinum

Mánadagin fer Jarðfeingi at lata loyvini í 3. útbjóðing. Einki av hesum loyvum ber kortini við sær boring. Kortini eru tey týðandi signal til okkum sjálvi og umheimin um, at her hendir nakað, at føroyska undirgrundin framvegis stendur ovarliga á breddanum hjá stóru altjóða oljufeløgum – og ikki minst – hjá okkara egnu myndugleikum. Feløgini fáa loyvi at gera ymsar kanningar, áðrenn tey so innan ávíst áramál skulu taka avgerð um, antin tey vilja fara víðari og bora brunnar. Spennandi verður at frætta, hvar loyvini liggja og hvussu stóran part av landgrunninum tey dekka.

Tann heilt stóri spenningurin í sambandi við føroyska oljuleiting er kortini ikki so nógv 3. útbjóðing sum tann ítøkiligi Anne Marie brunnurin, ið verður boraður í summar. Tað er italska oljufelagið ENI, sum stendur á odda fyri hesum brunni, ið verður tann sjeyndi á landgrunninum. Umboð fyri feløgini, sum eru við í boriætlanini, høvdu fund í Føroyum herfyri fyri at fáa enn fleiri brikkar í tí stóra og álvarsliga puslispælinum uppá pláss. Eitt nú varð vitjað í útgerðarhavnini í Runavík, sum enn einaferð verður útgerðarhavn fyri eina oljuboring á landgrunninum. Umframt ENI eru eisini Faroe Petroleum og Sieco við.

Nú tosað verður um truplari tíðir í Føroyum eru komandi brunnar, sum verða boraðir á landgrunninum, avgjørt nakað, sum eiga at geva okkum eina vón, teir hava ein psykologiskan týdning í eini annars heldur dapurskygdari tíð, tó at teir ikki eru nakað, sum vit skulu taka við í okkara framtíðar búskaparligu metingar. Anne Marie brunnurin og eisini 3. útbjóðing kunnu tó minna okkum á, at tað kunnu goyma seg virði í undirgrundini, sum kunnu vera við til at skapa bjartskygni, menning og loksins virksemi. Júst á sama hátt sum tá vit fóru til havs á sinni at leita eftir tá ókendum ella ótroyttum fiskasløgum, laksi, rækjum og svartkjafti.

Hóast vit enn einki prógv hava fyri, at olja finst í rakstrarverdugum nøgdum her, so hava vit kortini fleiri ítøkilig tekin um, at hetta er ein møguleiki. So tætt upp at okkara marki finst oljan, at sannlíkið fyri at hon eisini finst her hjá okkum er rættiliga stór. Men royndir aðrastaðni hava lært okkum, at tað tekur tíð, og at hepni skal eisini til, áðrenn tú rakar í blett. Latið okkum gleðast um, at loyvi enn einaferð verða latin oljufeløgum nú mánadagin. Uttan at taka nakað frá nøkrum, so kunnu vit tó staðfesta, at norska StatoilHydro hevur tikið yvir leiklutin sum drívandi lokomotivið á Føroyaøkinum. Talan er um eitt professionelt felag við neyðugu fíggjarligu orkuni og ikki minst við neyðugu tøkniligu vitanini og royndunum, sum nú kunnu koma Føroyum til góða. Uttan at taka munnin ov fullan, so eiga vit eisini at síggja oljuleitingina sum eitt ljós í myrkurinum. Fyrst var tað Eyðun Elltør. Síðani var tað Bjarni Djurholm. Nú er tað Johan Dahl, sum sleppur at seta hol á enn eitt týðandi kapittul í føroyskari oljusøgu. Góða eydnu.

Sosialurin

Kringvarpið fær 30 milliónir ov nógv

JONHARD HAMMER
Stjóri, Rás2

Skal seinasta samanberingin og argumentið hjá Kringvarpsstjóranum brúkast, so fær Kringvarpið í dag 30 milliónir krónur ov nógv at arbeiða við.

Annika Mittún Jacobsen segði við Sosialin í gjár, at í Danmark fær kringvarpið 3,2 miliardir krónur at arbeiða við. Varð hetta umroknað til føroysk viðurskifti - við at býta við 100 - so átti føroyska Kringvarpið at fingið 300 milliónir krónur.

Her mugu vit bara siga, at kommaið hjá Kringvarpsstjóranum var flutt eitt vet ov stutt, tí 3 miliardir, býtt við 100, gevur 30 milliónir krónur. So skal argumentið hjá Kringvarpsstjóranum nýtast – soleiðis sum hon so fegin sjálv vil - so má niðurstøðan verða, at Kringvarpið fær 30 milliónir krónur ov nógv.

Um hetta er rokniførleikin hjá hægstu leiðsluni í Kringvarpinum, so kann tað neyvan undra nakran, at fíggjarætlanin ikki gongur upp.

Stuðul ella kapping –ikki bæði

Tá Annika Mittún Jacobsen aðra staðni í blaðnum í dag skrivar, at tað er óbeinleiðis stuðul, tá Kringvarpinum verður noktað at lýsa á netinum, er hetta fullkomuliga misskilt.

Jú, Annika. Vit vilja fegin hava kapping á lýsingarmarknaðinum. Men vit vilja ikki hava eina kapping, har ein av aktørunum hevur tryggjað sær 62 milliónir krónur í kappingarstuðli frá skattaborgarunum, áðrenn kappingin yvirhøvur byrjar. Við slíkum fyrimuni eru sannlíkindini fyri, at nakar privatur miðil skal hóra undan kappingini ógvuliga nær null.

Tað er eisini júst hetta, sum hevur fört til tær skipanir, sum vit síggja uttanlands. Skipanir, har public-service stovnar aftur fyri at fáa kringvarpsgjald verða avskornir frá fríari kapping. Ella alternativt soleiðis, at kringvarpsgjaldið eisini verður býtt yvir á aðrar miðlar sum kompensatión. Altso altíð annaðhvørt og ikki bæði.

Tað var eisini júst hetta, sum Kappingarráðið vísti á, tá galdandi Kringvarpslóg var til viðgerðar í 2006. Og tað var eisini júst hetta, sum førdi til greiðu politisku semjuna, um at lýsingarinntøkur Kringvarpsins skuldu niðurlagast næstu fimm árini.

Men tí semjuna leggur Kringvarpið eftir øllum at døma eins nógv í, sum avgerðina um at hava tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir á stovninum.

Góð fólk í Kringvarpinum

Annars vísti dagurin í gjár, at tað veruliga er brúk fyri meira enn einari útvarpsrás í Føroyum . Tí meðan aðrir fjølmiðlar fylgdu týdningarmikla málinum um Kringvarpsstovnin og kringvarpsgjaldið, so valdaði fullkomin tøgn í Útvarpinum. Málið varð ikki tikið upp á tungu, hóast fólk kring alt landið í løtuni tosar um Kringvarpið og kringvarpsgjaldið.

Kringvarpsstjórin sigur í brævinum í dag, at tað er týdningarmikið, at tað verður kjakast um Kringvarpið, men tað er í øllum førum ikki galdandi fyri Útvarpið hjá Kringvarpinum. Sjónvarpið var tíbetur munandi frægari.

Og so undrar tað meg, at Kringvarpsstjórin førir fram, at orsaka av lønarloftinum, sum almennir stovnar hava, so kann Kringvarpið bara seta tey næstbestu fólkini, tí tað privata kann bjóða hægri løn. Her fer Kringvarpsstjórin alt ov langt, tí tað starvast nógv sera dugnalig fólk í Kringvarpinum, og tað er at niðurgera hesi við at kalla tey næstbest.

Onkuntíð kann verða neyðugt at taka stórseglið, áðrenn skútan siglur á land

KRISTINA SAMUELSEN
Stýrislimur í KVF

Smáseglini gera ov lítlan mun, Árni

Sjálvsagt skal brúgvin taka fulla ábyrgd fyri, at seglini ikki í nóg stóran mun eru repað í tíð, men tað skal tó ikki verða ósagt, at veðurforsøgnirnar úr MMR hava ikki verið tær greiðastu, og eingin ábending var frá reiðarunum, tá brúgvin varð mannað fyri knapt 2 árum síðani, at vit nú máttu sigla okkara egna sjógv.

Til spurningin um, hví vit ikki bara sigla skútuna á land, skal verða sagt, at stýrið í KVF ikki hevur nakað politiskt trygdarnet, tá peningur verður nýttur, sum ikki er har.

Verður stórseglið tikið, ber vónandi til aftur at seta stórsegl, við hjálp ella við verandi megi, áðrenn manningin rímir av skútuni.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.